Nr. 113/2019

Jóhannis Joensen
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur viðvíkjandi starvssetan av læknum, settur landsstýrismanninum í heilsumálum, Kaj Leo Holm Johannesen (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Ætlar landsstýrismaðurin at hækka játtanina til introstørv?
2. Heldur landsstýrismaðurin, at tað hevði borið til at stytt bíðitíðirnar í heilsuverkinum og havt meira støðugar læknar í økjum, har tað mangla læknar, um starvsfólkatilfeingið bleiv gagnnýtt betur?

Viðmerkingar:
Heilsuverkið í Føroyum manglar læknar. Nógvir borgarar hava ongan fastan kommunulækna, og bíðtíðirnar til serlæknaviðtalur eru langar.
Fyri at gerast serlækni eru nøkur stig ella størv, tú skalt í gjøgnum. Fyrsta stigið er KBU starv; hetta tekur eitt ár, og har hava vit fingið eina skipan, sum ger, at føroyingar hava framíhjárætt til størvini her. Næsta stigið er introstarv, sum er eitt hálvt til eitt heilt ár innan valdu serlæknagrein. Fleiri læknar taka meira enn eitt introstarv, um tey ivast í serlæknagreinini.
Í Føroyum hava vit í nógv ár snakkað um, at vit vilja hava fleiri serlæknar í heilsuverkið, og tí er spurningurin, um vit ikki skulu gera alt, vit eru ment til tess at útbúgva serlæknar. Í løtuni eru 15 føroyskir yngri læknar í Føroyum, men tað eru bert trý introstørv lýst leys. Tað vil siga, at vit hava 10-12 yngri læknar, sum mugu aftur til Danmarkar, um tey skulu koma nærri eini serlæknaútbúgving. Eru læknarnir fyrst farnir av landinum, er vandi fyri, at teir búseta seg uttanlands og ikki koma aftur.
Um tað eru fleiri kommunulæknar kring landið, sum eru áhugaðir í at taka ímóti læknum í introstørvum, hevði hetta samstundis økt um læknatilfeingið í teimum økjunum, har tørvur er á læknum.

Á Løgtingi, 22. juni 2020

Jóhannis Joensen